

Flakavirkið á Tvøroyri:

Ofta arbeiða tey yvir

- Vinnulívsskipanin her á Tvøroyri er minstlíka góð sum aðrar, sigur Dánjal av Rana, formaður í arbeiðsmannafelagnum Fylking

Stórur dagur var á Tvøroyri í gjár. Elsta arbeiðarafelagið í landinum, arbeiðsmannafelagið Fylking, fylti 80 ár.

Í gjár varð dagurin ikki hildin. Tað bíðar til í heyst, tá ein bók um felagið eisini kemur út.

Formaður í Fylking í nógv ár hevur verið Dánjal av Rana, sum eisini hevur verið býráðsformaður. Søguliga kann hann tí tala bæði vegna felag og býráð.

Dánjal heldur, tað er teimum sjálvum fyri at takka, at so frægt stendur til, sum tað ger á Tvøroyri.

- Felagið varð stovnað í 1915 við slagorðunum at bøta um fólksins kor. Fólkið skuldi eiga framleiðslutólini, og tað er ein hugsjón, sum eg framvegis haldi meg til, sigur Dánjal.

Hann hevur altíð hildið tað verið rætt, at bæði kommuna og Fylking hava stuðlað vinnulívinum, tí tað hevur loyst seg.

Felagið fór í síni tíð beinanvegin at byggja virki og keypa skip, við góðum stuðli frá kommununi. Tað hevur tað gjørt alla tíðina, og tað hevur loyst seg fyri allar partur. Fólkið hevur havt arbeiði, og kommunan hevur væl og virðiliga fingið pengarnar aftur, sigur Dánjal av Rana.

Fingu tað afturlønt

Honum dámdi ongantíð, at flakavirkið á Tvøroyri skuldi fara uppí Fiskavirking, og hann royndi at muta í móti, men einki gjørdist, sjálvt um virkið tá gekk væl. Kommunan hevði stuðlað virkinum við 18 mió. krónum, og haraftrat keyptu teir ein bygning frá virkinum fyri 5 mió. krónur.

- Eg haldi, at hetta virkaði psykologiskt á teir í Fiskavirking, sum løntu okkum tað aftur, soleiðis at okkara virki fekk meira arbeiði enn so mong onnur, sigur Dánjal.

- Vit hava nú havt kreppu í seks ár, og kreppur hava vit áður havt. Men hesi 18 árini, eg havi verið á lønargjaldsstovuni hevur ongantíð verið so galið, at vikulønir ikki hava verið goldnar.

Fáa staðni í landinum er so stútt arbeiði í fiski sum á Tvøroyri. Ein vanlig 40 tíma arbeiðsvika gevur 3.300 krónur. Vikurnar fyri páskir lógu vikulønirnar á virkinum á Tvøroyri millum 3.700 og 4.200 krónur. Upp í 200 fólk arbeiða á virkinum.

Tað hjálpir so væl, at fleiri skip eru á Tvøroyri, og ungir menn stremba framvegis fyri at fáa fleiri skip.

Haraftrat er flakavirkið í tí hepnu støðu, at tað arbeiðir havtaksu, kongafisk og svartkalva, sum menn á Tvøroyri vóru teir fyrstu at leggja seg eftir at fiska.

Tað nógva arbeiði sæst eisini aftur á tølunum fyri, hvussu nógv flakavirkisfólk fáa ískoytisstuðul frá ALS. Tað er millum nakað og einki.

Skattatrýstið

- Tað er einastandandi, at vit kunnu hava so nógv arbeiði, men hinvegin kunnu fólk ikki klára seg við tí ómetaliga høga skatt- og avgjaldstrýstinum. Heldur tað fram, rýma øll. Eg fati ikki, at tann spurningurin ikki uppteku politikararnar meira, sigur Dánjal.

Hann er framvegis líka sannførdur um, at teirra máti at fíggja vinnulívið er tann rætti, at fakfeløg og kommuna eiga í felag.

- Tað eru tey, sum finnast at hesi vinnulívsskipanini, men eftir mínum tykki hevur hon roynst minst líka so væl sum tann privatkapitalistiska. Um so kommunan hevur skuld, er eingin onnur kommuna, sum eigur so stórar ognir sum Tvøroyrar kommuna. Vit hava havt góðar tíðir og ringar tíðir, og tað fer at ganga. **randi**

Klagar aðru ferð

Tað líkist ongum, um landsumsitingin hevur koyrt fyrru klaguna um kommunulæknainnstillingina í Suðurstreymoy í pappírskurvina,. sigur Elin Lindenskov, býráðslimur í Havn

Undir verkfallinum, 31. mars, sendi Elin Lindenskov, býráðslimur í Havn, eitt telefax til landsstýrið. Bræv hennara var ein áheitan til javnastøðunevndina um at kanna innstillingarnar til kommunulæknastarvið í Suðurstreymoy.

Hetta gjørdi hon, ti hon ivaðist í, at innstillingarnar hjá Tórshavnar og Argja kommunum vóru í samsvari við javnstøðulógina, av tí at eingir kvinnuligir læknar vórðu innstillaðir. Millum teir 10 umsøkjararnar vóru skikkaðar kvinnur, og av teimum seks kommunulæknunum í Suðurstreymoy nú eru bara tvær kvinnur.

Men javnstøðunevndin fekk ongantíð klaguna, og tí hevur Elin Lindenskov nú skrivað aftur til landsstýrið.

Hon skilir ikki, at landsstýrið ikki hevur fingið hennara upprunaligu klagu. Tað skuldi verið nóg mikið at stílað tað til landsstýri, heldur hon og sigur seg vra vónsvikna, um tað eru politiskar ella persónligar orsøkir til, at brævið er horvið.

- Og er tað soleiðis, at eitt fax sum verður sent landsstýrinum, endar í pappírskurvini av ovart, er hetta tekin um ótrúligt gáloysni, sum ikki sømir seg eini landsumisting, skrivar Elin Lindenskov.

Bridge

FM kappingin í bridge fyri pør varð spæld leygardagin 22. apríl.

24 pør úr øllum landinum vóru við í finaluni. Kappingin byrjaði kl. 10.00 og endaði kl. 23.30. Longu tíðliga í kappingini løgdu Árni Dam og Marner Joensen seg klárt á odda, og hildu teir hesa leiðslu alla kappingina og gjørdust sostatt føroyameistarar 1995.

Eftir sum Árni og Marner tíðliga í kappingini løgdu seg klárt á odda var ongantíð ivi um fyrstaplássið, men kappingin um 2. og 3. plássið var meira spennandi.

Endamáliga støðan hjá teimum pørum, sum vóru yvir miðal, varð henda:

1. Árni Dam–Marner Joensen	229
2. Jóannes Mouritsen–Arne Mikkelsen	131
3. Bogi Simonsen–Reimund Langgard	108
4. Niels Nielsen–Trygvi Vestergaard	106
5. Dánjal P. Mohr–Per Kallsberg	76
6. Høgni Jacobsen–Kjartan Johansen	74
7. Árant Berjastein–Álvur Jøkladal	64
8. Oddmar Danielsen–Bjarki Johannesen	56
9. Óli Holm–Páll Augustinussen	37
10. Atli Hansen–Magni Jøkladal	32
11. Zacharias Joensen–Steinbjørn Zachariasen	32
12. Ásla Weihe–Sigrið Guðjónsson	28

Vert er eisini at leggja til merkis, at millum 3 tey ovastu pørini vóru 3 av spælarunum, Arne, Bogi og Reimund millum 17 og 20 ár. Vónandi eggjar hetta fleiri ungum at spæla bridge. Kappingin var annars væl fyriskipað, og kappingarleiðarin og hjálparfólk megnaðu uppgávuna til fulnar.

Eitt spæl hjá føroyameistarunum:

51. E-V/S

	KQ2 KJ8 AKQ103 86	
874 9754 872 A105	N V E S	AJ Q102 J64 KQ942
	109653 A63 95 J73	

S	V	N	E
	Marner		Árni
pass	pass	1 rú	2 kl
2 sp	pass	4 sp	a.p.

Útspæl kl A.

Mótspælið byrjaði við 3 ferðir kleyvara til trumf 2 á bordinum. Spaðar K til Ess og eystur spældi kleyvar 9 aftur. Suður gjørdi her eitt mistak við ikki at stinga høgt á hondini. Suður kastaði hjartara av og mátti tí stinga við frúnni á bordinum. Bordið spældi so hjartara til essið, og suður spældi so spaðar 10 til drongin. Nú spældi eystur enn einaferð kleyvara, sum gjørdi, at vestur altíð fekk stikk uppá trumf 8. Suður fór tveir niður og reinan topp til E-V.

Hetta spælið vísir, at Árni og Marner útnyttaðu mistakið hjá sunnan til fulnar. Eitt par, sum dugir at útnytta hesar møguleikar og gera færri mistøk enn hini, vil hava góðan møguleika at vinna.

Komandi vikuskifti verður seinasta umfar í Formula Xerox kappingini (FM fyri lið). Byrjað verður fríggjakvøldið kl. 19.00, og bridgeárið endar við veitslu leygarkvøldið.

Lands-
fundurin '95
verður á Kambsdali 28.–29. apríl
Føroya Javnaðarflokkur